

# Gongd á oljuútbygging við føroyska markið

**Jan Müller**

16.07.2015 - 11:30

Oljan.fo

Mestsum allan vegin framvið føroysk-bretska markinum er verulig gongd komin á fleiri stórar olju- og gassútbyggingar. Fyri sunnan er tað sokallaða Quad 4 útbyggingin, eisini kent sum Schiehallion feltið, sum verður útbygt og nútímansgjørt. Nakað longri norðuri er tað Clair Ridge útbyggingin, sum er í gongd, og loksins er tað fyrsta stóra gassútbyggingin vestan fyri Hetland, Laggan Tormore, sum er um at vera liðug. Hetta eru alt útbyggingar av verandi og nýggjum leiðum, sum tilsamans fara at kosta omanfyri hundrað milliardir krónur.

Ein av hesum útbyggingum, og sum liggur næst føroyska markinum, er Schiehallion og Loyal oljuleiðirnar. Hon er mett at kosta umleið 35 milliardir kr. Fyrsta framleiðslan á Schiehallion kelduni byrjaði í 1998 og eru framleiddar umleið 400 mill. tunnur higartil. Tað vísir seg at nógv meira olja er í goymslunum enn higartil hildið og fyri at kunna útvinna alla oljuna er neyðugt at gera stórar íløgur í um- og útbyggingar av feltinum. Ein spildurnýtt framleiðslu- og goymsluskip, FPSO, verður bygt og skal avloysa gamla skipið longu komandi ár. Tað verður bygt í Suðurkorea og hevur fingið navnið Glen Lyon. Skipið fer at kunna goyma 900.000 tunnur av olju og kann framleiða 130.000 tunnur av olju umframt stórar nøgdir av gassi um dagin. Upprunaliga varð mett, at Schiehallion og Loyal keldurnar goyma einar 600 mill. tunnur av olju. Nú eru metingarnar broyttar til umleið eina milliard tunnur. Og hetta

er olja, sum finst í undirgrund, ið liggur ikki so langt frá føroysku undirgrundini. So kann einhvør gera sær tankar um, hvat ikki føroyska undirgrundin kann goyma av olju, um so er, at umstøðurnar fyri olju eru tilsteðar her eisini.

BP, sum er fyristøðufelag fyri Quad 4 oljuútbyggingini, kunngjørdi nú um dagarnar fyrstu myndirnar av Glen Lyon oljuskipinum. Tað er 270 metrar langt og 52 metrar breitt og verður bygt á Hyundai Heavy Industry skipasmiðjuni í Suðurkorea.

Tað var í 2011, at BP og partnararnir Shell, Hess, Statoil, OMV og Murphy gjørdu av at brúka umleið 35 milliardir kr til hesa útbygging.
Umframt stóra framleiðslu- og goymsluskipið fevnir útbyggingin eisini um nýggjan útbúnað á havbotninum. Her er talan um eina ta størstu olju- og gassútbygging á havbotninum í heiminum yvirhøvur. Saman skulu útbyggingarnar leingja livitíðina hjá feltinum við 25 árum ella meira.

Sí eisini video av allari verkætlanini.

Kelda: www.offshoreenergytoday.com







